


# Kirkjugarður
*á Svínaryggi*

**Óli Jacobsen**
olijacobsen@post.olivant.fo



# Vikugamla Jacobine ímynd av politiskari søgu

**Í gamla kirkjugarði eru nógvar barnagravir, sum tað kann skrivast rættulig søga burtur úr. Í eini av teimum liggur Jacobine Kjærgaard Petersen, sum doyði bert sjey dagar gomul í 1901**

Tað er so heppið, at í kirkjugarðsprotokollini verður ofta hjá børnum tilskilað, hvør pápin er. So tá ið tað sást, at henda lítla var dóttir "sysselmand Petersen", var sloppið!

Fyrst er tað hetta forkunnugu millumnavnið Kjærgaard, sum er ein partur av okkara søgu.

Tað stavar frá einum donskum skipara Poul Christian Kjærgaard, sum giftist við Maren Margrethe Jacobsdatter (1798-1845), dóttir Jacob Nolsøe handilsforvaltara, beiggja Nólsoyar Páll.

Tað kann vera gitt, at hann hevur siglt uppá Føroyar og hevur tá hitt konuna. Tey munnu hava verið búsett í Danmark, tí bæði børnini eru fødd har.

Helst er Poul Christian deyður ungur, og tá er Marin Margretha flutt aftur til Føroya, her hon eisini endaði sínar dagar.

Tey fingu tvey døtur, sum hvør á sín hátt við síni ætt at komu at merkja føroyskan politikk.

Eldra dóttirin var Anna Maria Nicolina Kjærgaard f. 25. 9. 1845. Hon giftist við Niels C. Winther, kendur sum okkara fyrsti "sjálvstýrispoli tikkari". Hann varð valdur í Fólkatingið, og hann byrjaði eisini fyrsta blað í Føroyum, Færingetidende, sum tó ikki fekk langt lív lagað. Tað kom bert út níggju ferðir.

Hin dóttirin var Anna Cathrina Jacobina Kjærgaard (1831-1871), sum giftist í Havnar Kirkju 25.11 1858 við Enok Daniel Bærentsen (1831-1900), umrøddur fyrr í hesi røð. Enok var kendur politikkari og handilsmaður.

Ein sonur teirra var Christian Bærentsen, fyrsti og einasti føroyingur, sum gjørdist amtmaður, eisini umrøddur í hesi røð.

Ein systir Christian Bærentsen var Valborg f. 19.12 1868 í Havn. Hon giftist við Thomas Juul Petersen, føddur í Streymnesi 25. 12 1868. Foreldur hansara vóru Marie Sophie Michelsdatter og Petur Hansen, Hvalvík.




*Foreldrini hjá Jacobinu vóru Valborg og Thomas Juul Petersen*



*Maria var tvíburasystir Valborg*



*Ein kendur beiggi Valborg var Thorstein Petersen*

Tað vóru tey, sum áttu lítlu Jacobinu, uppkallað eftir ommuni. Tað man annars hava verið nakað sjáldsamt at seta ein gravstein yvir eitt vikugamalt barn. Men tað gjørdu tey í Bærentsenættini. Tí eru so nógv sjónlig minni eftir tey í kirkjugarðinum. Her eru eisini grivin børn hjá Christian Bærentsen.

Thomas Juul hevur havt gott orð á sær. Tað sæst í minningarorðunum, sum eru skrivað um hann, tá ið hann doyði í 1926, bert 57 ára gamal.

## Løgtingsmaður og sýslumaður

I Onsdags er Sysselmand fyri Nordøerne og Postekspeditør i Klaksvig Thomas Juul Petersen afgaaet ved Døden 57 Aar gammel.

Afdøde har i mange Aar været sygelig og dog passet sin Tjenestemandsgerning indtil midt i Sommer.

For en Uges Tid siden blev han indlagt paa Dronning Alexandrines Hospital, og Tilstanden har været haabløs siden.

Th. J. Petersen var i mange Aar Kontorist paa Landfogedkontoret og blev Fuldmægtig sammested i 1896. I 1899 blev han Sysselmand på Østerø (1898-1910) og forblev i denne Stilling, indtil han i 1910 blev Sysselmand og Postekspeditør i Klaksvig.

Sysselmand Petersen var i flere Aar Medlem af Lagtinget valgt for Østerø Præstegæld. Ellers har han ikke offentligt blandet sig i politiske Forhold i de senere Aar.

Han Lig blev med Smiril overført til Klaksvig. Amtmanden, Dommeren og afdødes herværende Slægt og Venner var mødt paa Kongebroen for at tage Afsked. Det samme var tilfældet med et stort Antal Lagtingsmedlemmer af begge Partier.

Begravelsen fandt sted paa Klaksvig Kirkegaard.

Thomas Juul var løgtingsmaður 1903-1910, frá 1906 var tað fyri sambandsflokkin. Hann var í sóknarstýrinum í Klaksvík 1914-1922. Í hesum tíðarskeiði var hann formaður 1914-1917 og 1918-1919.

## Norðingar mist ein góðan mann

Í øðrum minnigarorðum verður m.a. sagt:

Við hansara burturferð má sigast, at norðingar hava mist ein góðan mann. Hann var av teimum góðu gomlu føroyingum í lyndi og hugsunarhátti og bar prógv av tí arbeiðshugi og noysomheit, sum tey gomlu vóru uppvand í. Arbeiði var ikki honum eina byrða ella ein plága, sum ein ger burtur av sær so skjótt sum møguligt, fyri at sleppa frá tí, men ein kær uppgáva, ið altíð var gjølla og umhyggiliga røkt uttan treytir.

Hann var ein pliktuppfyllandi maður og vann sær harígjøgnum tað sjálvbjargni, sum merkti hann bæði í forholdum til yvirmenn og tey, ið treingja til at berast yvir við.

Hann var smámanna vinur av teimum bestu, altíð ársakandi og verjandi tey, ið minst formáa og ein hatari av stórmannavold og kúgan. Samstundis var hann friðarmaðurin, ið skýggjaði alla ósemju. Hann fyribyrgdi mangan trætnað manna millum.

Lógkønur var hann, og mangt forlík eydnaðist honum at fáa í lag, so rættargongd bleiv ónýtt.

Arbeiðshugur hans kom kommununi og øðrum almennum til góðar. Her hevur hann lagt niður eitt stórt arbeiði.

Tá hann kom higar í sýslumansembætið, var hann hin fullbúgvni, erfarni og álítandi maðurin, sum øll kundu venda sær til í góðum treysti. Tað krevur ídni og dugnaskap hjá honum, ið verða skal eftirmaður hansara at uppfylla tær krevjingar, fólk nú seta til sýslumannin í Norðoyggjum.

Við hesum fáu minnisorðum vil eg bera tí farna manni mína og Norðoyinga tøkk fyri alt tað góða, vit áttu saman við honum. Signað verið hansara minni!



*JACOBINE KJÆRGAARD PETERSEN*
*FØDD 21. OKTOBER 1901 DEYÐ 28. OKTOBER 1901*

## Børnini

Børnini hjá Valborg og Thomas vóru fødd í Havn. Tey vóru:

**Aksel Petersen** f. 1897, giftist við Esther.

**Maria Juul Petersen** f. 1901. Hon var tvíburasystir Jacobinu. Giftist í 1928 við Alexander Magnus Petersen úr Klaksvík. Men hann doyði longu í 1930. Tey fingu eina dóttir, Valborg.

Maria flutti til Havnar og lat í 1938 upp postalínshandilin Svalin, sum var har "Ebenezer" er í dag.

Ein sera kendur sonur var **Thorstein Petersen** (1899-1960), sum gjørdi seg galdandi sum sakførari, politikkari og sum stjóri í Sjóvinnubankanum.

Hann var løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin, valdur í Suðurstreymoy frá 1940-1954. Hann var formaður í løgtinginum 1943-45, 1945-1946 og eitt skifti í 1950, og landsstýrismaður var hann 1950-51. Eisini var hann fólkatingsmaður 1943-1950. Hann varð valdur í fólkatingið í 1957, men hann tók ikki sætið. Thorstein var ein lyklapersónur í føroyskum politikki alt hetta tíðarskeiðið ikki minst undir krígnum, tá hann eisini var norskur konsul. Sum tað sæst hava feðgarnir báðir verið tingmenn fyri hvønn sín flokk.

Thorstein giftist við Onnu Sofíu Olsen f. 1901, ættað av Lava í Havn.

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt frá Onnu og Harald Haraldsen av teirri kendu ættini á Trappuni.